Almannaverkið og Almannamálaráðið

# Avrikssáttmáli

# 2015

Mál og avriksáttmáli fyri 2015

# 1. Inngangur

Hesin sáttmáli er gjørdur millum Almannaverkið og Almannamálaráðið.

Mál- og avrikssáttmálin er skrivlig avtala millum stjórnarráð og stovn, um hvørji mál skulu verða rokkin í einum fíggjarári.

## 1.1. Um Almannaverkið

Almannaverkið er ein hornasteinur í føroysku vælferðarskipanini, ið umsitur eina røð av sosialum skipanum. Høvuðsuppgávurnar hjá Almannaverkinum eru:

- *Sosialráðgeving:* Hvørja viku ringja 1.000-1.500 fólk og Almannaverkið móttekur uml. 500 skriv um vikuna
- *Menningartænastur:* 750 borgarar tørva endurmenning fyri at klára seg sjálvi aftur. 6.000 hjálpartól eru útleigað
- *Trivnaðartænastur:* Samanlagt verða uml. 750 tænastur veittar og eru hesar býttar á 165 bústaðir, 160 verkstøð, 190 onnur dagtilboð, 230 fáa stuðul og 21 eru undir barnavernd
- *Fíggjarligar veitingar:* Hvønn mánað verður rindað 15.000 veitingar uppá tilsamans 80-90 mió. Veitingarnar eru pensjónir, forsorg, dagpeningur, barnagjald o.a.

**Missión**

Missiónin hjá Almannaverkinum er:

*Vit veita sosialar tænastur, so allir borgarar í Føroyum*
*fáa lívsumstøður, ið vælferðarsamfelagið ásetir*

**Visión:**

Tann yvirskipaða visjónin hjá Almannaverkinum er:

*Vit vilja gera mun,*
*við at veita bestu og mest framkomnu sosialu tænastur*

## 1.2. Fíggjar- og starvsfólkaviðurskifti:

Almannaverkið fer væntandi at hava uml. 750 starvsfólk í 2015 móti uml. 1.500 í 2014. Stóri munurin stavar frá, at eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita 1. januar 2015.

Almannaverkið umsitur netto 1.357.766 tús. kr. á løgtingslógini fyri 2015 , soleiðis:

| Játtan 2015 | Lógarbundið | Stuðulsjáttan | Rakstur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 1.057.859.000 | 3.800.000 | 323.983.000 | 1.385.642.000 |
| Inntøkur | -15.034.000 | | -12.842.000 | -27.876.000 |
| Netto | 1.042.825.000 | 3.800.000 | 311.141.000 | 1.357.766.000 |

Størsti parturin av játtanini til Almannaverkið er lógarbundin játtan. Mál og avrikssáttmálin snýr seg um rakstrarpartin í stovninum og fyrisitingarliga partin av teimum lógarbundnu útreiðslunum.

### 1.3. Bygnaður

Almannaverkið er bygnaðarliga skipað, sum myndir niðanfyri vísir:




Tey 750 starvsfólkini í Almannaverkinum starvast í trimum deplum, umframt við felags- og hjálpifunktiónum. Uml. 95 % starvast í deplunum og 5 % í fyrisitingini.

## 2. Mál 2015

Fyri at tryggja at sáttmálin í nóg stóran mun fevnir um alt virksemið hjá Almannaverkinum, verður fyri tey ymisku málini tikið útgangsstøði í høvuðsuppgávunum. Tað verður tí ásett mál fyri hvørja av høvuðsuppgávunum hjá stovninum:

- Sosialráðgeving

- Menningartænastur
- Trivnaðartænastur
- Fíggjarliga veitingar

## 2.1. Sosialráðgeving

Strategiskur málsetningur í 2015:

*Tað skal vera einfalt fyri borgaran – Almannaverkið ber kompleksitetin*

| Mál | Støðan í dag | Tiltøk | Væntaður virknaður |
|---|---|---|---|
| Tann góða tilgongdin verður sett í verk | Mett verður at 350-550 persónar lúka tey klinisku eyðkennini fyri diagnosuni autismu. Fólk við autismu og familjur teirra eru ofta ein viðbrekin bólkur og krevja ofta samskipaði tiltøk, sum fleiri myndugleikar skulu veita. Mett verður at tilboðini og samskipanin millum myndugleikar er ikki nøktandi (víst verður til Tilmæli um at skipa ein góða tilgongd fyri familjur við barni við autismu, 9. september 2014)<br><br>"Tann góða tilgongdin" er ein skipaður samstarvsleistur, sum skal tryggja eitt dygdargott samskipað heildartilboð til børn við autismu og familjur teirra, har avvarðandi myndugleikar taka ábyrgd av sínum parti av tænastuni og taka ábyrgd at samstarva og samskipa tænastuna við aðrar myndugleikar. | Góða tilgongdin verður sett í verk við AV sum samskipara. Miðað verður eftir at 31. desember 2015 skulu allar familjur við børnum við autismu vera komin undir hesa skipanina.<br><br>Ætlanin er, at skipanin verður sett í verk í stigum, soleiðis<br>1) Familjur við barni, sum hevur diagnosuna autismu<br>2) Familjur við barni, sum fara at fáa staðfest diagnosuna autisma<br>3) Familjur við barni, sum hevur diagnosuna autismu, men sum AV í dag ikki hevur samband við | Familjur við barni við autismu fáa eina greiðari og betur samskipaða tænastu. |

## 2.2. Menningartænastur

Strategiskur málsetningur í 2015:

*Borgarin skal í størst møguligan mun klára seg sjálvan*

| Mál | Støðan í dag | Tiltøk | Væntaður virknaður |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| At kunna veita betur og effektivari tænastu til borgarar, sum hava tørv á hjálpitólum og endurvenjing | Endurvenjing er í dag skipað í hølum, sum ikki eru serliga væl egnað til endamálið.<br>Hølini, sum virksemið fyri hjálpartól hevur, eru frá seint í 80'inum og er ikki væl egnaði at lata eina framkomna tænastu, ið ger mun fyri brúkaran. Tá ið hølini vóru tikin í nýtslu vóru um 500 lán avgreidd um árið. Í dag verða um 2000 tól lánt árliga, umframt at stovnar og vardar bústaðir leiga hjálartól. Tískil eru hølini ov lítil til virksemið. | Nýggj miðstøð fyri endurvenjing og hjálpartól, verður tikin í nýtslu. Hetta fer at geva betur tænastu, tí<br>• AV kann hava framsýning av nýggjastu hjálpartólunum<br>• Royndarbaðirúm og royndarkøkur til uppvenjing og til kanning í sambandi við húsabroyting<br>• Goymslan fær betri rúmd og verður betur skipað<br>• Reingerð av hjálpartólum fer at lúka nýtímans krøv | Viðskiftafólk verða betur hjálpt til størri sjálvbjargni |

## 2.3. Trivnaðartænastur

Strategiskur málsetningur í 2015:

*At borgarin hevur sjálvsavgerðarrætt*

| Mál | Støðan í dag | Tiltøk | Væntaður virknaður |
|---|---|---|---|
| Allar eindir, uttan eind 9 og 10, skulu skipa borgara-/ avvarðandiráð í 2015.<br>Endamálið er at geva borgarunum størri ávirkan. | Uml. 140 borgarar hava vardan bústað. Bústaðurin er heimið hjá hesum borgarum, og eiga tey at hava ávirkan á viðurskifti, sum hava við bústaðin at gera. Við at skipa borgara-/ avvarðandiráð fær borgarin eina rødd. Hjá summum er neyðugt, at tað eru avvarðandi, sum geva borgaranum eina rødd. | Málið er, at átta av 10 eindum skulu skipa ráð. Fýra eindir hava skipað ráð, tvær hava gjørt eina roynd, men ov lítil undirtøka var. Hesar eindir royna at skipa ráð aftur á vári 2015. Tvær eindir fara at skipa ráð í fyrru helvt av 2015. | Borgarar á vardum bústaði, fáa størri møguleika at ávirka viðurskifti sum hava við bústaðin at gera. |

## 2.4. Fíggjarligar veitingar

Strategiskur málsetningur í 2015:

*Skynsom umsiting av fíggjarligum veitingum*

| Mál | Støðan í dag | Tiltøk | Væntaður virknaður |
|---|---|---|---|
| Allar viðgerðir og veitingar verða | AV hevur síðan 2008 ment nýggja | Fasa 1 liðug, t.e. allar veitingar verða | Betur stýring av fíggjarligum veitingum: |

| | | | |
|---|---|---|---|
| avgreiddar elektroniskt gjøgnum Heildarskipanina. | Heildarskipan. Fasa 1 av hesi verkætlan skuldi upprunaliga vera liðug í 2010, men verkætlanin er nógv seinkað. Trý av fýra virkisøkjum eru í dag verksett, og væntast Fasa 1 at verða liðug medio 2015. | avgreiddar í Heildarskipanina. | - Meira automatiseringar<br>- Betri umsitingar-amboð<br>- Tryggari málsviðgerð<br>- Samkoyring við aðrar skipanir |

**3. Ársfrágreiðing**

Almannaverkið letur Almannamálaráðnum skrivliga frágreiðing um avrikini í seinasta lagi 1. mars 2016.

**4. Avrikssáttmálin**

Ásetingar í hesum sáttmála verða umrøddar á regluligum fundum millum Almannaverkið og Almannamálaráðið.

Verða fyritreytirnar munandi broyttar, eftir at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, um partarnir eru samdir um tað.

*Tórshavn, tann* 25.02 2015

| Almannamálaráðið | Almannaverkið |
|---|---|
| Eyðun Mohr Hansen aðalstjóri | Edvard Heen, stjóri |